VINNUMÁLARÁÐIÐ

## Vinnumálaráðið sóknast eftir fólki við løgfrøðiligari útbúgving

Ein av stóru avbjóðingunum á vinnuliga økinum er at gera og halda viðlíka lógir, ið samsvara við ta løggávu, sum er galdandi í londunum kring okkum, og sum vit hava vinnuligt samstarv við. Hetta er neyðugt, skulu vit halda viðlíka okkara samstarvsavtalur við onnur lond, víðka um tær og fáa í lag nýggjar avtalur, og fyri at føroyskt vinnulív kann gera seg galdandi í altjóða høpi.

**Millum lógarøkini, talan er um, eru**
- Vinnufelagalóggáva
- Sjólóggáva
- Ársroknskaparlóg
- Grannskoðaralóggáva
- Tryggingarlóggáva
- Veterinerlóggáva

Hevur tú áhuga fyri hesum øki, so átti tú at søkt hetta sera spennandi starvið í Vinnumálaráðnum.

Tú kemur at arbeiða saman við fólkum, ið hava ábyrgd av nevndu lógarøkjum, og sum arbeiða við vinnuligum viðurskiftum sum heild og hava samband og samstarv við útlendskar myndugleikar og stovnar, bæði í Norðanlondum og ES.

**Førleikar**
Tú hevur løgfrøðiligt embætisprógv ella annað samfelagsfrøðiligt prógv.

Vit vænta, at tú ert arbeiðsom/samur, dynamisk/ur og hevur góð samstarvsevni. Tú samskiftir skilliga bæði á føroyskum, skandinaviskum og enskum máli og hevur evni og vilja at virka í einum stimbrandi og avbjóðandi umhvørvi.

**Vit bjóða**
At gerast partur av einum spennandi umhvørvi, ið gevur møguleikar fyri persónligari menning, bæði við arbeiðsroyndum og viðkomandi eftirútbúgving, bæði innan- og uttanlands. Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya ella avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Send okkum eina umsókn við prógvum og viðmælum í seinasta lagi 15. desember 2008. Umsóknir skulu sendast til:

Vinnumálaráðið
Postsmoga 377
Tinganes
FO-110 Tórshavn

Áhugað eru vælkomin at ringja til Arna Poulsen á telefon 556070.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

Søkt verður eftir

## Umsjónarleiðara til Sørvágs kommunu

### at byrjað 1. januar 2009

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:**
- at fyrisita og leiða Sørvágs Havn
- at fyriskipa og leiða umsjónina av økjum og ognum hjá kommununi

**Vit vænta at tú:**
- hevur leiðsluroyndir
- dugir væl at samstarva við onnur
- ert røkin og dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur teldukunnleika
- hevur koyrikort
- kann ráðgeva í tekniskum viðurskiftum.

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt fjølbroytt og spennandi starv við góðum møguleikum at menna seg
- møguleika fyri skeiðum innan arbeiðsøkið

**Setanarviðurskifti:**
- Starvið er fulltíðarstarv
- Lønar og setanarviðurskifti verða sambært sáttmála millum KAF og avvarandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn skal sendast til:

*Sørvágs kommunu*
*Varðagøta 8*
*FO-380 Sørvágur*

Umsóknirnar skulu merkjast »Umsjónarleiðari«

Eru spurningar, fæst meira at vita við at ringja á tlf. 363200 ella 233200.

Sørvágs kommuna skilar sær rætt til at velja ímillum umsøkjarnar ella ongan at seta.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknarfreistin er 8. desember 2008 kl. 12.00

**Sørvágs Kommuna**
www.sorvag.fo
VARÐAGØTA 8 · FO-380 SØRVÁGUR
SORVAG@SORVAG.FO · TEL 363200

## Hús til sølu

Hús (kann nýtast sum summarhús) til sølu í Gråsten, Danmark. Liggja sera væl fyri, tætt við strond, golfbana í serflokki, bátahavn, handlar og frítíðardepil (www.marinafiskenaes.dk). Uml. 1 tími í bili frá Esbjerg. 15 km frá týsku grensuni.

**Prísur: 860.000,-**

Húsini kunnu síggjast á heimasíðuni hjá **www.home.dk**, sagnr. 703-3753.

**Tlf. 223021**

## Jólasøla 2008

Árliga jólasølan hjá Føroya Heimavirkisfelag verður í ár 29. og 30. november í ítróttarhøllini á Hálsi. Á sølubásunum verður eins og undanfarin ár, eitt stórt úrval av heimavirkaðum lutum/pløggum, bæði virkað siðbundi føroyskt og við nýggjum íblástri. Eisini verður café á staðnum við føroyskum viðskera og onkrum søtum omaná.

**Opið verður hesar tíðir:**
**Leygardagin frá kl. 10.00 til 19.00**
**Sunnudagin frá kl. 14.00 til 19.00**

Atgongumerkið kostar kr. 30,00 fyri vaksin, meðan børn upp til 14 ár hava ókeypis atgongd. Atgongumerkið er samstundis lutaseðil um:
3 gávukort á kr. 500,00
3 gávukort á kr. 300,00
úr handlinum hjá felagnum Tina Mik, Niels Finsensgøta 35, Tórshavn, har eisini er stórt úrval av heimavirkaðum lutum.

Vit skulu eisini gera vart við, at ikki ber til at gjalda við gjaldskorti á flestu básunum

Føroya Heimavirkisfelag

VINNUMÁLARÁÐIÐ

## Søkt verður eftir avloysara til Vinnumálaráðið

Fyri løgfrøðing í barsilsfarloyvi verður søkt eftir avloysara til Vinnumálaráðið frá 1. februar 2009 og fram til 1. desember 2009.

Høvuðsuppgávan hjá løgfrøðinginum er at ráðgeva landsstýrismanninum og stjóranum í løgfrøðiligum spurningum. Harumframt fevnir arbeiðið um gerð av lógar- og kunngerðaruppskotum og máls- og kæruviðgerð.

Umsøkjari skal hava løgfrøðiligt embætisprógv og skal duga føroyskt og enskt væl.

Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

Send okkum eina umsókn við prógvum og viðmælum í seinasta lagi 15. desember 2008.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Vinnumálaráðið
Postsmoga 377
Tinganes
FO-110 Tórshavn

Áhugað eru vælkomin at ringja til Arna Poulsen á telefon 556070.